# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 20.09.2021 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Gunnhild Mortensen
Niels Olaf Eyvindsson
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi

Ikki møtt: Ronni Hammer
Eir J. Norðberg

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Til ummælis – umsókn um sundurbýti av matr.nr. 139a, Hvalba.**
   Umsókn um loyvi at frábýta umleið 2.241 m2 av matr. nr. 139a.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

2. **Til ummælis – umsókn um sundurbýti av matr. nr. 57a, Nes-Hvalba.**
   Søkt verður um sundurbýti av matr. nr. 57a, Hvalba – lutir í Nesi, umleið 1.988 m2 til samanlegg-ing við matr. nr. 57g og 57f.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

3. **Innkomin tilboð uppá sløkkiliðsbil v/útgerð til Hvalbiar.**
   Tilbúgvingarleiðarin hevur heintað trý tilboð inn uppá nýggjan sløkkiliðsbil.
   P/F Reyni Service – Toyota Proace Long 2,0 Comfort Master: kr. 305.850,00 v/MVG
   P/F Wenzel – Ford Transit Custom Trend 170 HK L2H2: kr. 275.000,00 v/MVG
   P/F Auto Service – Citroen Jumper 33 KV HDi 140 L2H1 Flex: kr. 240.000,00 v/MVG
   **Fíggjarnevndin 20.09.2021:**
   Samtykt varð einmælt, eftir tilmæli frá tilbúgvingarleiðaranum, at mæla til at taka av tilboðnum frá P/F Wenzel kr. 275.000,00 v/MVG.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **Suðuroyar Barnaverndartænasta - hølisviðurskifti.**
   Stýrið fyri BVT í Suðuroy hevur í longri tíð arbeitt við at kanna møguleikarnar fyri at betra um

núverandi hølisumstøður. Stýrið mælir til, at hildið verður fram við at leiga núverandi hølir, at gjørdur verður ein sáttmáli uppá 6 ár og at arbeitt verður víðari við uppskoti 1, har kjallarahæddin verður tikin við í leigumálið.

**Fíggjarnevndin 20.09.2021:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at fylgja tilmælinum hjá stýrinum fyri BVT.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

5. **Suðuroyar Barnaverndartænasta – umsókn eykajáttan 2021.**

Framrokningarnar fyri 2021 vísa eina samlaða meirnýtslu í ár uppá kr. 1.681.742,00. Parturin hjá Hvalbiar Kommunu av hesum er kr. 240.994,00.

**Fíggjarnevndin 20.09.2021:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at játta umsóknini um eykajáttan 2021.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

6. **Innkomin tilboð uppá klæðing av vitanum í Hvalba.**

Tvey tilboð eru komin inn uppá klæðing / umvæling av vitanum.

| | |
|---|---|
| Tommy Olsen: | kr. 38.795,00 |
| SH-Bygg Sp/f: | kr. 37.600,00 |

**Fíggjarnevndin 20.09.2021:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f SH-Bygg.

**Avgerð:**

Samtykt varð við trimum atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

7. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Janus Thomsen Niels Olaf Eyvindsson Martin í Nesi

Thorstein Thomsen Gunnhild Mortensen